

# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 14
November 2012

ISSN 1603-0036

Tríggjar nýggjar frímerkjaútgávur
Vel ársins frímerki 2012
Ársins endasøla
Nýggj postgjøld 1. januar 2013

Posta
FAROE ISLANDS




Royndarprent FO 750-758

# Føroyski árabáturin

Hin føroyski báturin er súðubygdur. Súðubygging er tað gamla bátasmíði hjá norrønu bátabyggjarunum. Við hesi tøknini smíðaðu norðbúgvar teirra bátar fyri meira enn 1000 árum síðani og sigldu og nomu kend og ókend lond um stóran part av norðurhøvum.

Hin føroyski árabáturin hevur helst sín uppruna í smábátum hjá landnámsmonnunum. Báturin er sagdur at vera tað ítasta, hitt føroyska handverkið hevur skapað, og hevur hann sítt pláss ímillum teir vakrastu og mest fullkomnu bátar í heiminum.

Í 1000 ár hevur hann ment og broytt seg, til hann hevur fingið sítt endaliga skap. Báturin er sjógóður, løttur undir árini og góður siglari við seglum; borðini eru tunn, bondini kløn, ikki eitt træsprek er óneyðugt, og hóast hetta er hann sera sterkt bygdur. Hann er evnaður og passaður til firðirnar og sjógvin um Føroyar. Hann er løttur, og í brimi kann hann í eini handavending takast av fáum monnum. Hann er smidligur í sjónum, løttur at rógva um streymtangar, og hann er snúiligur í trongum sjógvi.

Men tað, sum ger hann betur skikkaðan enn nakran annan bát í heiminum at nýta í føroyskum sjógvi, eru røðini: hin ferhyrnti árarleggurin, tollurin, árarskeytarnir, borðskeytarnir og homlubandið; hesi tilsamans gera, at árin liggur føst og styðjar bátin betur enn nøkur onnur røði í óslættum sjógvi.

Føroyski báturin er ymiskur til støddar. Størsti báturin var seksæringurin við seks røðum, tólv mans róðu, og vóru seksæringarnir um 28 føtur til longdar. Síðani komu 10- mannafør, 26 føtur, 8- mannafør, 24 føtur, 6- mannafør, 22 føtur, og 4- mannafør, 20 føtur. Minstu støddirnar vóru tristur, 18 føtur og tríbekkur, 17 føtur.

Krøvini, ið vórðu sett til ein dygdarbát, kundu vera eitt sindur ymisk, t.d. dámdi teimum á brimplássum betur at hava rúmligar og upprendar skutar, tí øll inn- og uppskipan mátti fara fram har. Men fólkið á plássum, har tað var fjøruslætt, noyddust ikki at hugsa so nógv um tað.

Tollurin saman við homlubandinum og borðskeytanum er meira ella minni serføroyskur. Tollurin er gjørdur úr eik. Serstaka sniðið ger, at fólk hava navngivið ymisku partarnar av tollinum eftir mannahøvdinum, tí tey hava hildið hesi líkjast. Framúr er nøsin ella nevið, holið verður rópt eygað, og ovast aftantil á tollinum er nakkin.

Árarnar á føroyska bátinum líkjast burtur úr øðrum árum, tær hava sítt heilt serstaka snið. Hin føroyska árin er long og mjá, árar-




blaðið er smalt og snúað. Árarnar eru sum oftast úr furu.

Homlubondini vóru fyrr í tíðini evnað úr húðálum, ella helst úr bøkslinum av grindahvali.

At stýra bátinum undir sigling varð nýtt stýri, tvey sløg eru, leysastýri og fastastýri. Leysastýrið líktist einari ár, men er øðrvísi skapað. Fastastýrið var gjørt úr tveimum samansettum fjalum og hongt upp aftast í bátinum.

Eyskar er eitt ílat at oysa við, og sigst at vera ein av týdningarmestu leysalutum umborð. Tey føroysku eyskørini hava sjáldsama vakurt skap, holaði úr einum viðastubba, til tíðir úr rekaviði, oftani evnað við oyrum í erva aftantil á holuni, so tað heldur væl upp á sjógvin.

Nøglan var tann seinasti luturin bátasmiðurin gjørdi. Orðatakið sigur, at "*maður eigur ikki at smíða nøgluna fyrr enn bátin*" Nøglan skal telgjast áttakantað, og tann endin, ið skal í holið, skal rundast. Nøgluholið skal borast í kjalarborðið í bakborð.

Masturin er leys og varð einans havd uppi, tá ið siglt varð. Fyrr í tíðini var seglið altíð eitt rásegl við einari stuttari vatnrættari rá, so seglið var smalt í erva og breitt í neðra. Tá siglt varð við tí gamla seglinum, stóð masturin mitt í bátinum, í siglubekki. Miðskeiðis í 1800 talinum bleiv vanligt at hava tvey segl, eitt sokallað asymmetriskt rásegl og eitt stint aftan. Tá bleiv masturin flutt fram á fremsta bekkin, toftubekkin.

Tað hevur altíð verið trupult at smíða ein bát, sum bæði er góður at rógva og góður at sigla við seglum. Hin føroyski árabáturin er fyrst og fremst ein róðrarbátur, tí hevur seglið havt minni týdning enn árarnar í føroyska bátinum.

Sagt hevur verið, at neyvan nakað fólk í heiminum hevur sína søgu, lagnu og tilveru so nær knýtta at havinum sum føroyingar, og báturin hevur átt lívið í føroyinginum, antin tá farið var at søkja havsins ríkidømi, ella tá ið farast skuldi um sund og fjørð.

*Andras Sólstein*




FO 759 Royndarprent

# Sepac 2013 - smálomb

Her úti í Atlantshavinum kemur várið, av natúrligum orsøkum, eitt sindur seinni enn á Europeiska meginlandinum. Tað er tí kanska ikki so løgið, at vit leingjast eftir tí og varnast eitthvørt tekin um, at tað er í nánd. Hóast 22. februar frá gamlari tíð telur sum fyrsti várdagur, skulu vit longur fram á árið áðrenn broyting kemur í. Á grækarismessu tann 12. mars koma tjøldrini aftur til oyggjarnar, og á bænadiktsmessu, várjavndøgur, merkist at várið er byrjað.

Ein mánað seinni, umleið flaggdagin 25. apríl, er tað so, at mætasta og mest virðismetta várteknið vísir seg. Øll, stór sum smá, gleða seg til hendingina. Vit kveita langtandi niðan í bøin, serliga har vit vita, at tey fyrstu plaga at koma.

Og so brádliga stendur tað har – ársins fyrsta smálamb. Ein evarska lítil og ullint vera við stórum eygum og oyrum – og sum djóraungar flestir, ótrúliga fitt at síggja til.

Tað hevur eina løgna ávirkan á fólk at síggja ársins fyrsta lamb. Vit siga øðrum frá tí, hvønn lit tað hevur, og hvar vit sóu tað. Fólk, ið fara framvið staðnum, steðga á fyri at eygleiða tað nýføddu veruna og sjónin kann lokka bros fram á sjálvt tað mest veðurbitna andlitið.

Seinni koma so fleiri, og tað er ein sonn fragd at síggja tey smáu lombini spæla og beistast í bønum. Tey leypa í kring, stútast og klintra upp á grótið, ið er allastaðnis. Føroyingar ala ikki seyð fyri ullina, og tí koma lombini fyri í øllum hugsandi litum. Hvít og svørt, grá og brún eru vanligastu litirnir, og ofta eru tey marglitt, alt eftir uppruna.

Tað kemur meir enn so fyri, at ærin av einhvørjari orsøk ikki vil kennast við lambið og fer frá tí. Hesi lombini verða tí tikin heim og gødd við fløsku. Heimalombini síggjast uttanfyri húsini fyrra partin av summarinum, og summi gerast so tom, at tey mest av




øllum minna um hundahvølpar. Sovorðin lomb gerast ofta kelidjór hjá børnunum, og tað er ikki altíð uttan grát og tannagrísl, tá tey skulu flettast um heystið.

Lombini fylgja ærini restina av summarinum. Tey súgva nakrar mánaðir og fylgja annars mammuni í hagan. Seyður er staðbundin og heldur seg oftast til ávís beiti í haganum. Hesin eginleikin gongur í arv frá ær til lomb, ið síðan koma at halda seg til sama beiti.

Føroyski seyðurin er meira upprunaligur enn tey aldu seyðasløgini aðrar staðir. Hann er sterkari og fimari og stendur seg væl uttan umsjón – sjálvt í illgongdum fjallalendi, har aldu seyðasløgini skjótt høvdu bukkað undir. Ullin er tjúkk og ikki so krúllut og hevur eitt lag av grovari vatnskýggjandi ull uttast, ið er vælegnað til skipstroyggjur. Tann fínara ullin innanfyri kann brúkast til fínari klæði, og seinastu árini eru fólk farin at framleiða snildisliga sniðgivin pløgg úr føroyskari ull.

Lombini vaksa seg stór um summarið og eru í haganum til heystfjallið verður gingið. Tað, at seyðurin gongur í haganum heilt fram til flettingina, ger, at kjøtið hevur serstaka góðsku, ið ikki finnist hjá seyði, ið hevur gingið á kultiveraðum beiti. Villu kryddurtirnar, ið eru partur av beitinum, setur smakk á kjøtið – og tað, at seyðurin gongur í fjallalendi, ger, at kjøtið er fast og soltið.

Men alt hetta tosið um ull og kjøt má tó bíða hesa tíðina, nú vit øll ganga og leingjast eftir vári, lívligum smálombum og fínmæltum smálambajarmi.

Mætasta vártekin, ið finnist.

*Anker Eli Petersen*




FO 760-763 Royndarprent

# Sjógæti

Tað er ein sannroynd, at allur fiskur og skeljamatur úr Norðurhøvum er sera vælsmakkandi og heilsugóður. Okkara streymviðurskifti, hitalag og gróður í okkara maritimu floru og faunu geva optimalar vakstrarumstøður.

Altjóða rákið innan gastronomi, har størri og størri dentur verður lagdur á uppruna føðivørur, ger seg nú eisini galdandi á okkara leiðum, og hava Føroyar soleiðis eisini undirskrivað kenda *Manifestið* sum *Ny Nordisk Mad* rørslan virkar undir. Í Danmark er sum kunnugt matstovan NOMA kosin sum heimsins besta, meðan tað í Føroyum er matstovan KOKS við úrmælinginum Leif Sørensen sum mynda rákið. NOMA og KOKS hava tætt samskifti og er ongin ivi um, at gastronomiska føroyska ferðamannavinnan fer at vaksa komandi árini, og tann fyrsta føroyska Michelinstjørnan er ikki langt burtur.

Av okkara skeljafiskum er tað jomfrúhummarin, sum verður mest nýttur. Við sínum eleganta vælsmakki er hann nógv eftirspurdur á flestu matstovum í Føroyum. Eisini verður nakað av jomfrúhummarinum útfluttur til leiðandi matstovur í grannalondunum .

Eisini síggja vit meira til taskukrabban, har stovnurin er í stórum vøkstri og so tannkrabban, sum verður veiddur á bankunum. Bæði hesi forkunnugu og í føroyskum gastronomiskum høpi nýggju krabbasløgini eru sera vælsmakkandi og áhugaverd.

Síðan føroyingar í 1970-unum av álvara fóru at luttaka í grønlendska rækjufiskiskapinum, kemur nógv rækja til Føroya, og er hon sera væl umtókt bæði privat og á matstovum. Okkara egnu rækjustovnar við Føroyar eru ov lítlir at gagnnýta.

*Jóhan Mortensen*

**Taskukrabbin** - *Cancer pagurus*
Skelin á taskukrabba er reyðbrún. Klørnar hava ein violettan dám, oddurin er svartur. Ein sær mun á kvenn- og kallkrabbunum á lúkuni á búksíðuni. Kvennkrabbarnir hava breiðari lúku. Kjøtið í klónum er hvítt og fast, tó er kjøtið í kroppinum leysari og brúnligari á liti.
Skelin kann blíva 30 cm breið tó sjálvdan breiðari enn 20 cm, og krabbin kann viga í mesta lagi 5 kg.

Um summarið livir taskukrabbin á 1-30 metra dýpi og um veturin á 30-50 metra dýpi. Hann livir fyri tað mesta á hørðum botni, t.v.s. hellubotni. Taskukrabbin etur mest botndjór, so sum krækling, øður o.a.
Tá taskukrabbin er um 5-6 ár, er hann kynsbúgvin. Taskukrabbin skiftir skel um summarið, og tá hann hevur blakað gomlu




skelina og fingið nýggja, fer hann at parast. Honin kann goyma sáðið frá hanninum í fleiri ár. Aftaná eina paring kann honin gýta upp til 3 ferðir. Honin gýtir upp til 3 milliónir rogn um heystið og goymir rognini allan veturin uppi undir sær.

Í Føroyum hevur taskukrabbin ongan vinnuligan týdning, men í Íslandi, Noregi, Danmark og Bretlandi verða um 25.000 tons veidd um árið.

**Tannkrabbi** - *Chaceon affinis*
Vit vita sera lítið um hendan krabban orsakað av, at hann ikki finnist inni við land, og eingin verulig veiða hevur verið eftir honum fyrr enn um aldaskiftið.
Á enskum verður krabbin nevndur *"Deep sea red crab"*. Føroyska heitið *tannkrabbi* hevur hann fingið orsakað av, at hann hevur tenn í klónum.

Í sínámillum avtaluni millum Føroya Landsstýri og grønlendska Heimastýri, varð í 2000 loyvt einum grønlendskum skipi at royndarfiska eftir krabba á ytru leiðunum á føroyska landgrunninum. Fyrsta royndin í hesum sambandi fór fram í februar 2000.

Tannkrabbin, ið roynast skuldi eftir undir Føroyum, var vanlig hjáveiða í garnafiskiskapinum eftir havtasku. Nakað av royndum at fiska krabba hava verið áðrenn 2000, bæði at fiska hann við rúsum og at selja hann uttanlands, men ongin veruligur fiskiskapur kom í lag við føroyskum skipum fyrr enn í 2006.

Krabbin verður fiskaður við rúsum á leiðum í ein útsynning úr Føroyum á um 500 metra dýpi. Rúsurnar verða vanliga settar í trossum við umleið 25 favnum millum hvørja rúsu, annars er mannagongdin átøk teirri, tá ein setur gørn. Veiðan hevur ligið um 280 tons um árið.
Beinini á krabbanum eru kløn, og av tí er ikki so nógvur matur í teimum. Hinvegin eru kløurnar stórar og fullar av sera góðum og vælsmakkandi krabbakjøti. Nakað av kjøti er eisini í kroppinum.

**Rækja** - *Pandalus borealis*
Rækjan er reyð við einum langum horni framúr høvdinum við spískum tornum. Hon kann blíva upp til 16-17 cm.
Rækjan livir m.a. av ormum, lívrunnum avfalli, algum og ymiskum smádjórum og sjálvar eru tær føði hjá størri fiski, so sum toski, kalva, svartkalva og laksi.

Tey fyrstu árini er rækjan hannur - hon er tvíkynjað (hermafrodit). Á sunnaru økjunum har sjógvurin er heitari, er rækjan hannur í 2 ár og á norðaru økjunum har sjógvurin er kaldari, er rækjan hannur í 4-7 ár. Aftaná hetta tíðarskeiðið skiftir rækjan kyn og livir nú restina av lívinum sum hon. Lívið hjá eini rækju byrjar sum rogn undir høvuðsskálini. Síðani verða rognini flutt og goymd undir fremstu svimjibeinunum á undirsíðuni. Hon ber um 1000-1500 rogn.

Útbreiðslan á rækjuni, ið eitur *Pandalus borealis* á latíni, er frá teimum sunnaru økjunum á meginlandssokklinum í Norðsjónum og Skagerrak og á eystursíðuni á USA sonevnda "Gulf of Maine".
Í teimum norðaru økjunum finnist hon í Barentshavinum, Noregi, Føroyum, Íslandi, Danmarksstrætinum millum Grønland og Ísland og Davidsstrætinum millum Grønland og Kanada. Rækjan finnist eisini í norðara partinum av Stillahavinum við Alaska og norðara partinum av Japan.

Rækjan livir á bleytum botni frá 50-600 metrar dýpi, tó eru tær sæddar djúpari enn 1000 metrar. Hitin er um 0-8 °C.
Fyri føroyingar hevur rækjan havt vinnuligan týdning síðan seinast í sekstiárunum. Mesta veiðan var í sjeyti- og áttatiárunum.

**Hummari** - *Nephrops norvegicus*
Jomfrúhummarin er reydligur. Um framkroppin og høvdið er hørð skel, sum er fest á bakið, og hongur niður við báðum liðum. Undir skelini báðumegin eru táknir. Bakkroppurin er í 7 liðum. Aftasti liður eitur sundbløkan. Hummarin svimur á tann hátt, at hann slær sundbløkuna upp undir seg; men tá svimur hann aftureftir.

Hummarin er 3-5 ár, tá hann er kynsbúgvin. Tey um 4000 rognini verða fruktaði undir gýting, og honin goymir rognini undir bakbeinunum í 8-9 mánaðir, áðrenn tey verða klakt. Hummarin gýtir annaðhvørt ár, frá mars til november. Sum ungur skiftir hann ham fleiri ferðir um árið, seinni bara annaðhvørt ár. Fyrst rivnar skelin á bakinum, og dýrið krýpur úr haminum. Fyrstu tíðina eftir hamskiftið er hummarin illa fyri. Hann er ikki førur fyri at standa á beinunum. Kvennhummarin blívur í mesta lagið 20 cm, og kallhummarin 25 cm.

Hummarin við Føroyar er ein serføroyskur stovnur, og búleikast mest inni á firðum. Hummari er tó eisini fingin longri úti á Landgrunninum. Hann heldur til á mórubotni, sum er egnaður at grava holur í, sum hava fleiri inn- og útgongdir. Hummarin livir á dýpum frá um 15-500 metrar.
Hummarin veiðir mest um náttina, og livir hann av smáum botndjórum s.s. ormum, slangustjørnum og krabbum.

Í fiskiskapinum við rúsum hevur veiðan ligið millum 30 og 100 tons árliga, í miðal um 55-60 tons. Minsta veiðumát á hummara er 13 cm, ið mátast fremst á høvdinum til miðjan afturkant á sundbløkuni.

Hummarin er leskiligt skeljadjór, kjøtið er ljóst og hevur sera fínan tættleika (konsistens).

*Mourits Mohr Joensen*

# Nýggj postgjøld 1. januar 2013

## Brævastøddir

| Smábrøv | Miðalbrøv | Stórbrøv |
|---|---|---|
| 23 x 17 x 0,5 cm í mesta lagi | 33 x 23 x 2 cm í mesta lagi | Longd + breidd + tjúkd í mesta lagi 90 cm |
| 23 x 17 cm | 33 x 23 cm |  |
| **0,5 cm tjúkt** | **2 cm tjúkt** | **l+b+t 90 cm** |

## Innanoyggja brøv

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 7,00 | 9,00 | 11,00 |
| 51 - 100 g | | 12 kr | 16 kr |
| 101 - 250 g | | 19 kr | 23 kr |
| 251 - 500 g | | 31 kr | 35 kr |
| 501 - 1000 g | | 42 kr | 46 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 58 kr |

## Evropa og Norðurlond

***A-brøv***

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 12,50 | 14 kr | 17 kr |
| 51 - 100 g | 16,00 | 17 kr | 22 kr |
| 101 - 250 g | | 31 kr | 38 kr |
| 251 - 500 g | | 55 kr | 61 kr |
| 501 - 1000 g | | 90 kr | 97 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 146 kr |

## Evropa, Norðurlond og A-brøv til Íslands

***B-brøv***

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 8,50 | 10,50 | 13 kr |
| 51 - 100 g | | 13 kr | 17 kr |
| 101 - 250 g | | 26 kr | 34 kr |
| 251 - 500 g | | 45 kr | 53 kr |
| 501 - 1000 g | | 74 kr | 80 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 105 kr |

## Onnur útlond

***A-brøv***

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 14 kr | 18 kr | 23 kr |
| 51 - 100 g | 17 kr | 28 kr | 34 kr |
| 101 - 250 g | | 52 kr | 57 kr |
| 251 - 500 g | | 103 kr | 110 kr |
| 501 - 1000 g | | 172 kr | 183 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 283 kr |

## Onnur útlond

***B-brøv***

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 10,50 | 15 kr | 19 kr |
| 51 - 100 g | | 24 kr | 30 kr |
| 101 - 250 g | | 45 kr | 51 kr |
| 251 - 500 g | | 76 kr | 82 kr |
| 501 - 1000 g | | 116 kr | 133 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 210 kr |



Jan Håfström og Edward Fuglø
Myndir: Dávur Winther

# Útgávutiltak í Stockholm

Posta gav 24. september 2012 út tvey frímerki við norðurlendskari samtíðarlist. Skipað varð fyri stórum hátíðarhaldi við m.a. listaframsýning og føroyskum viðskera í hesum sambandi á Kunstakademinum í Stockholm.

Hugskotið, at gera eina parafrasu við Edwardi Fuglø og Jan Håfström yvir tvey frímerki, eigur Niels Halm, stjóri í Norðurlandahúsinum.

Jan Håfström úr Svøríki er útbúgvin innan heimspeki og myndlist og sigst vera millum fimm tey kendastu listafólkini í Svøríki. Hann hevur m.a. tríggjar ferðir verið við á "Bienalinum" í Venedig, sum er ein heiður í sær sjálvum. Eisini hevur hann fingið fleiri listaprísir.

Edward er fyrsti føroyski listamaðurin, ið er boðin at stilla út á Kongaliga Kunstakademinum í Stockholm. Henda framsýningin var við verkum av bæði Jan og Edward.

Framsýningina hava Jan Håfström, listamaður og Jan Åman, leiðari á Kunstakademinum, sett upp.

Frímerkini eru, sum sagt, ein dupultparafrasa, ið merkir, at ein listamaður nýtir brot úr verki hjá einum øðrum listamanni.

Jan Håfström hevur gjørt eitt merki við ímyndini úr teknirøðini Fantomet, har Mr. Walker er við á myndini og lítur yvir eitt bygdarlag, sum Edward Fuglø hevur málað. Frímerkið verður kallað: *Mr. Walker on the Faroes*.

Edward Fuglø hevur gjørt eitt frímerki, har hann letur nakrar spanskar munkar, ið Jan Håfström hevur gjørt við ímyndini, "Hin góði deyðin", bera eitt av eggunum, sum Edward hevur málað. Frímerkið verður kallað: *Egg procession for Jan.*

Á henda hátt hava tveir kendir listamenn heiðrað hvønn annan og annars













verið við til at varpa ljós á hvønn annan.

Rithøvundar, arkitektar, listaummælarar, útgevarar, útvarpsmenn og redaktørar saman við hópin av øðrum vóru við til útgávutiltakið. Hesi vóru við til at viðmerkja listaframsýningina og frímerkini hjá báðum listamonnunum, sum fór fram á einum stórum rundborðsfundi beint eftir útgávuna.

Eftir fundin varð boðið til eitt væl borð-reitt borð - bert við føroyskum viðskera so sum skerpikjøti, turrari grind, turrum fiski, spiki, lomviga, hvonnum og hópin urtum og grønmeti. Ein tann kendasti kokku-rin í Svøríki, Stefan Eriksson hagreiddi matin. Hann hevði m.a. stóra virðing fyri Leif Sørensen, sum hann hevði hoyrt til ein matfyrilestur á matstovuni NOMA.

Seinni var listaframsýningin opin fyri almenninginum og vóru nógvir frímerkja-savnarar og vitjaðu.

Ein spennandi dagur á Kunstakademinum í Stockholm, sum setti Posta, Edward Fuglø og Jan Håfström í eitt serligt ljós.

Tí verður roknað við, at henda útgávan ikki fer ómerkt aftur við borðinum og fer at geva afturljóð í mangar mátar.

*Dávur Winther*

# Vel ársins frímerki 2012
# og vinn 2000,- kr



FO 724 A



FO 724 B



FO 725



FO 726



FO 727



FO 728



FO 733



FO 729



FO 730



FO 734



FO 735



FO 736



FO 737



FO 738




FO 739-744




FO 745




FO 746




FO 747



FO 731-732




FO 748




FO 749

**1. vinningur er 2000,- kr.**
**2. vinningur er nýggja árbókin 2012**
**Eisini draga vit lut um 5 ársmappur 2011**

Klipp lepan út og send okkum hann ella atkvøð á www.stamps.fo
Seinasta freist at atkvøða er 15. mars 2013!

**Ja,** takk. Eg vil fegin tekna meg fyri tíðindabrævið frá Posta Stamps, sum verður sent við telduposti

**T-postur:**

Navn: ______________________

Bústaður: ______________________

Postnr./Bygd: ______________________

______________________

T-postur: ______________________

Kundanr.: ______________________

**Ársins frímerki 2012 er:**

# Ársins endasøla

Hin 31. desember 2012 er seinasti søludagur fyri frímerkini og vørurnar á hesum síðum.

Hetta er tískil seinasti møguleiki at ogna sær frímerkini fyri áljóðandi virði.

Vørurnar kunnu bíleggjast á bíleggingarlepanum mitt í blaðnum ella á heimasíðu okkara: www.stamps.fo.




FO 659-660

## Europa 2009




FO 667-668




FO 669-671

## Sepac 2009




FO 672




FO 675-676




FO 659-660




FO 661-666




FO 651-658

## Heftimappa 2008



## FDC-mappa 2008




## Ársmappa 2008




## Árbók 2008



# Nýggjar frímerkjaútgávur - 25. februar 2013




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Føroyski báturin** |
| Útgávudagur: | 25.02.2013 |
| Virði: | 9 x 7,00 kr. |
| Nummur: | FO 750-758 |
| Frímerkjastødd: | 25,50 x 22,72 mm og 65,88 x 22,72 mm |
| Arkstødd: | 125 x 90 mm |
| Tekningar: | Edward Fuglø |
| Gravure : | Martin Mörck |
| Prenthåttur: | Offsett / stálprent |
| Prentsmiðja: | Beijing Stamp Printing House, Kina |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja, 0 - 50 g |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Sepac 2013 - smálomb** |
| Útgávudagur: | 25.02.2013 |
| Virði: | 12,50 kr. |
| Nummur: | FO 759 |
| Frímerkjastødd: | 63 x 23,52 mm |
| Tekningar: | Marita Gulklett |
| Prenthåttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til Evropa 0-50 g |




| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Sjógæti** |
| Útgávudagur: | 25.02.2013 |
| Virði: | 7,00, 9,00 23,00 og 34,00 kr. |
| Nummur: | FO 760-763 |
| Frímerkjastødd: | 40 x 29 mm |
| Lagt til rættis: | Astrid Andreasen |
| Prenthåttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv og miðalbrøv innanoyggja 0-50 g, stórbrøv til onnur lond 0-50 g og 51-100 g |

Framsíðumynd: Jarmandi smálamb. Myndatøka: faroephoto.com
Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo